DAGSINS MEINING

Ein óverdugur landsst‡risma›ur

Mangt ver›ur í ney›ini n‡tt. Serstakliga tá man sjálvur hevur komi› sær í trupulleikar. Ta› er undirbrotliga, lygnaktuga og ómansliga avsannanin hjá landsst‡rismanninum í mentamálum av sínum egnu úttalilsum í Sosialinum eitt gott dømi um. Máli› er hetta: Eftir at Torbjørn Jacobsen hev›i kunngjørt, at grundlógardagurin ikki longur er frídagur, finst løgma›ur at honum. Bla›ma›ur okkara fær vi›merkingar frá bá›um tveimum. Landsst‡risma›urin, i› er kendur fyri síni avgjørdu úttalilsi, heldur seg heldur ikki aftur hesafer›. Løgma›ur fær av at vita. Landsst‡risma›urin gloymir bara, at løgma›ur er hansara arbei›sgevari. Tá lei›slan í Tjó›veldisflokkinum fær frænir av, hvat landsst‡risma›urin hevur sagt um løgmann, fer hetta ísakalt ni›ur eftir rygginum. Hetta má ste›gast, á›renn ta› kann fáa avlei›ingar.

Forma›ur Tjó›veldisfloksins bønar tí bla›i› um ikki at koyra úttalilsini í bla›i›. Bla›lei›slan svarar aftur, at bla›i› er fari› til prentingar, og hevur annars onga haldgó›a orsøk til at skula taka úttalilsi hjá einum landsst‡rismanni í einum máli, har hann sjálvur hevur lagt upp til konfrontatión vi› løgmann, aftur - bara fyri at bjarga hesum landsst‡rismanni sessin. Blø›ini eru ikki ansingarstovnar hjá landsst‡rismonnum. Teir avgera sjálvir, hvat teir vilja hava út í mi›larnar og mugu tí eisini taka fullu avlei›ingarnar av tí. Men ta› vildi Torbjørn Jacobsen ikki, og tá hann sá, at hann var gingin løgmanni ov nær, ba› hann Sosialin um ikki at prenta samrø›una. Hann vildi sostatt ikki standa vi› ta›, hann annars hev›i sligi› fast vi› sjeytummaseymi. Men ov seint var. Samrø›an var farin gjøgnum maskinarí›i›. Hetta er eitt mál um, at ein landsst‡risma›ur má vera ma›ur fyri at taka avlei›ingarnar av sínum egnu or›um og ger›um.

Men ta› tordi hann ikki. Landsst‡rissessurin og maktin vóru meira verd enn æran og trúvir›i›. Nú ráddi um at handla skjótt og for›a fyri, at løgma›ur koyrdi mannin frá. Tá bla›i› liggur í bla›sølunum fær útvarpi› avsannan og treytaleysa umbering frá landsst‡rismanninum. Vi› ø›rum or›um etur tann so meinf‡sni landsst‡risma›urin øll or›ini í seg aftur, men á ein slíkan ómansligan hátt, at hann nú bráddliga ikki vil kennast vi› sítt egna barn. Hetta er tann mest jánkasliga og feika avger›in, i› nakar landsst‡risma›ur hevur tiki› í føroysku politisku søguni: *»Undirrita›i hevur ongantí› brúkt hetta or›i› (leigursveinur um løgmann, red) og kundi eiheldur nakrantí› funni› uppá ta›«* og *»tí ver›a tey or›, eg eri sitera›ur fyri, hervi› avsanna› treytaleyst«*. Ma›urin, i› ongantí› hevur hildi› seg aftur at siga sína hugsan og standa vi› ta› hann meinar, kemur nú vi› eini loddrættari lygn og leggur bla›i› undir at siga ósatt. Øll vita, eisini løgma›ur, at slík úttalilsi eru landsst‡rismanninum lík, og tí er avsannan og umbering fullkomiliga óney›ug. Bla›i› stendur aftan fyri hvørt einasta or› bla›ma›ur okkara hevur sett á bla› í hesum máli og kann dokumentera úttalilsini hjá landsst‡rismanninum til eina og hvørja tí›.

Sosialurin

Tórbjørn l‡gur

Eftir at hava tiki› munnin ov fulla, hevur Tórbjørn Jacobsen vi› beinlei›is lygnum og ósannindum bjarga› sær undan at ver›a koyrdur úr starvi vi› at turka sær upp í Sosialin

Í tí›indaskrivi t‡skvøldi› vísir Tórbjørn Jacobsen, landsst‡risma›ur, aftur partar av innihaldi í samrø›u, sum prenta› er í Sosialinum í gjár.

Av tí at landsst‡risma›urin leggur Sosialin undir at bera ósonn tí›indi, hava vit hesar vi›merkingar til tí›indaskrivi›:

Tórbjørn Jacobsen var› uppringdur av bla›manni okkara um vi›merkingar til strí›i› millum hann og løgmann um broytingina í rundskrivi um frídagar í fólkaskúlanum. Í hesum sambandi fullu fleiri hvøss or› um løgmann. Tá ein landsst‡risma›ur sigur slíkt, kunnu vit sum fjølmi›il ikki anna› enn taka ta› fyri fult.

Tórbjørn Jacobsen vísir aftur, at hann hevur skírt løgmann »leigusveinur«. Or› hansara, sum eru banda›, vóru hesi:

»...sum tann danski leigusveinurin í Føroyum, sum Anfinn Kallsberg er, hevur hann bara handla› samsvarandi bo›unum frá sínum harra...«

Bla›ma›urin spyr sí›an, um hann fer at taka avger›ina um at flyta frídagin aftur, eins og løgma›ur ynskir, og Tórbjørn Jacobsen svarar:

»Eg geri einki ví›ari vi› hetta. Tann avger›in, sum eg havi tiki›, stendur vi›, so má Anfinn gera hvat hann vil«.

Sí›ani spyr bla›ma›urin, um Tórbjørn Jacobsen roknar vi›, at hetta kann fáa avlei›ingar fyri hann sjálvan – og at hann møguliga ver›ur koyrdur frá. Og hann svarar:

»Ta› eri eg fullkomiliga líka gla›ur vi›! Fullkomiliga! Sleppi eg ikki at dríva politikk eftir mínum egna høvdi, so fari eg! So havi eg einki at sita her til. Eg tími ikki at vera majonettfigurur hjá nøkrum ø›rum…

Ví›ari í samrø›uni sigur Tórbjørn Jacobsen, tá hann ver›ur spurdur, um hann hevur naka› at leggja afturat:

»…hann (løgma›ur, red) hevur havt voldtægtsforbrydarar sitandi í mána›vís, eftir at ta› hevur veri› sta›fest, og ta› hevur hann fanin meg ikki klára› at gjørt naka› vi›. Og hann hevur sjálvur síni lík í lastini, so hann skal ansa eitt líti› sindur eftir«

Vit kunnu tí bara sta›festa, at landsst‡risma›urin l‡gur, tá hann sigur, at Sosialurin hevur bori› ósonn tí›indi.

Ta› er eisini átalu vert, at forma›ur Tjó›veldisfloksins, Høgni Hoydal og Tórbjørn Jacobsen, landsst‡risma›ur, á henda hátt royna at ste›ga frælsa tí›indaflutninginum og seta til viks grundleggjandi demokratiska rættin hjá fjølmi›lunum at virka – óheftir av landsins lei›slu.

Ta› er ey›sæ›, at landsst‡risma›urin hevur stigi› vi› sí›una av. Men ta› er líti› mansligt av honum at turka ta› upp á Sosialin, sum hann hevur gjørt í hesum máli. Tórbjørn Jacobsen eigur alla ábyrgd av hesum »mistaki« - tí ver›ur »avsannan« hansara vi› hesum víst aftur, og hóskandi hev›i veri›, at landsst‡risma›urin kom vi› eini umbering.

bla›stjórnin

Tórbjørn Jacobsen: Avsanning og umbering til løgmann

Í sosialinum til mikudagin 22. nov. Er ein stórt uppsett grein, har undirrita›i ver›ur sitera›ur fyri at skíra løgmann, Anfinn Kallsberg, at vera »leigusveinur« hjá donsku stjórnini.

Undirrita›i hevur ongantí› brúkt hetta or›i› um løgmann og kundi eiheldur nakrantí› funni› upp á ta›.

Harumframt eru í greinini ein rø› av ø›rum vi›urskiftum og ákærum móttvegis løgmanni, sumeg eri sitera›ur fyri.

Undirrita›i vil hervi› treytaleyst avsanna øll úttalilsir í greinini, sum snúgva seg um løgmann.

Haraftrat eru eisini brot, har eg eri sitera›ur fyri ikki at vilja halda landsins lógir. Hetta ver›ur somulei›is treytaleyst avsanna›.

Greinin er úrslit av eini samrø›u í sambandi vi› aktuella máli› um flytingina av einum frídeg í skúlaverkinum frá grundlógardegi (5. juni) til 1. mai.

Undirrita›i hevur havt samrø›u vi› bla›mann á Sosialinum í dag og hevur eftir at hava hoyrt um innihaldi› í greinini, roynt at fáa stø›ga› greinini í at fara til prentingar, sum landsst‡risma›urin ikki kennir seg aftur í.

Hetta hevur tíverri ikki bori› til.

Undirrita›i má taka sína ábyrgd av hesum mistaki, og tí ver›ur givini ein tryetaleys avsanning og umbering til løgmann.

Greinin ber í øllum brá av, at sjógvur og ósemja ver›ur løgd millum løgmann og landsst‡rismannin í mentamálum, og ta› hevur undirrita›i onga ætlan um at gera í hesum máli.

Tí ver›a tey or›, eg eri sitera›ur fyri, hervi› avsanna› treytaleyst.

Máli› sn‡rs eg um, at eitt rundskriv er sent føroysku skúlunum um frídagar og har er 1. mai frídagur ísta›in fyri danska grundlógardagin (5. juni).

Í nøkur ár frammanundan skúlaárinum 1996/97 høvdu skúlarnir ikki frí grundlógardagin (5. juni), men sí›ani var› hann aftur settur sum frídagur frá skúlaárinum 1996/97.

Sí›ani eru fleiri rundskriv send um frídagar í føroyska skúlaverkinum, og tískil skuldi ongin løgfrø›isligur trupulleiki veri› í hesum.

Eg eri somulei›is sitera›ur fyri at siga, at eg vil føra politikk eftir egnum høvdi. Ta› er sjálvsagt, at mál av t‡dningi eiga at fáa eina politiska vi›ger› í landsst‡rinum sum fyriskriva› í starvsskipan landsst‡risins. Hetta mál ver›ur sjálvsagt vi›gjørt á komandi landsst‡risfundum.

Undirrita›i ehvur bo›a›a løgmanni frá hesum tí›indaskrivi.

Tórshavn 21. nov. 2000
Tórbjørn Jacobsen
landsst‡risma›ur

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Bara tveir hóra›u undan

Stór útskifting er í b‡rá›num í Runavíkar kommunu eftir vali› t‡sdagin. Sjey n‡ggir limir, me›an tveir ver›a sitandi. Vali› var ómetaliga spennandi, og bara ein atkvø›a avgjørdi tann seinast valda limin. Tvær kvinnur megna›u at koma innum í mun til onga seinasta valskei›, og Rodmund Nielsen var stóri atkvø›uslúkurin

KOMMUNUVAL
Stefan í Skorini

Stórur spenningur var, me›an teir taldu. Úrsliti› gjørdist, at bara tveir limir vór›u afturvaldir

Runavík: Fólki› í Runavíkar kommunu hevur tala›. Úrsliti› er eitt heilt n‡tt b‡rá›. Sjey n‡ggj andlit ver›a at síggja á b‡rá›sfundum komandi valskei›, me›an tveir garva›ir limir halda áfram.

Longu á›renn vali› var greitt, at í minsta lagi f‡ra n‡ggir limir máttu veljast, tí f‡ra limir í fráfarandi bygdará›i valdu ikki at stilla upp. Tríggir av teimum, sum hætta›u sær at royna einafer› afturat, fullu fyri hamaranum. Onkur av teimum fráfarandi limunum seg›i, at ta› var gott, at hann ikki valdi at stilla uppaftur, tí hann hev›i óiva› veri› vraka›ur.

B‡rá›slimirnir, sum ikki stilla›u uppaftur, vóru Jákup E. Lamhauge, b‡rá›sforma›ur, Jónsvein Knudsen, Frithleif Olsen og Ey›un Gaardbo. Teir tríggir b‡rá›slimirnir, sum fullu, vóru Hans Jacob Lamhauge, Ólavur Olsen og Niels Juul Kristiansen, i› var varalimur fyri Jákup Paula Olsen, sum er fluttur av landinum.

Hans Jacobi vanta›i bara eina atkvø›u fyri at ver›a afturvaldur, men kanska ein fínteljing fer at broyta hetta. Sum landi› liggur nú, hevur Hans Jacob Lamhauge 77 atkvø›ur, me›an Regin Jacobsen hevur 78. Tískil er ta› Regin, sum fer avsta› vi› sessinum. Annars kundu atkvø›urnar, sum skiltu tey sí›stu valevnini, teljast á einari hond.

Tvær kvinnur sluppu inn í Runavíkar b‡rá›. Ta› er eindømi í valdøminum, at tvær kvinnur eru valdar.

Marja Lamhauge og Sæunn Ólavsdóttir Hansen fingu bá›ar 81 atkvø›ur í part, sum var nóg miki› til at bera tær innum gáttina.

Bæ›i Kári P. Højgaard og Hans Tausen Olsen hava veri› b‡rá›slimir hetta valskei›i›, og vóru teir bá›ir afturvaldir. Kári kom trygt inn, og hann fekk næstflest persónligar atkvø›ur.

Toppskorari var Rodmund Nielsen vi› 135 atkvø›um, og hann er eitt heitt evni til b‡rá›sformann.

Stórur spenningur

Teir, sum taldu atkvø›urnar upp á tí størsta valsta›num, søgdu seg ikki minnast eitt so spennandi val. Ein av orsøkunum til hetta var, at stór útskifting var í b‡rá›num, men eisini tí at ta› var so ómetaliga tætt millum valevnini. Tí var sera spennandi at bí›a eftir atkvø›unum frá teimum smærru valstø›unum.

Í fimleikahøllini í skúlanum á Glyvrum, i› var ta› størsta valsta›i›, høvdu 874 fólk greitt atkvø›u.

Vi› seinasta val vóru f‡ra listar, men hesufer› vóru bara tríggir. Listi C var fyri Søldarfjør›, sum fekk ein b‡rá›slim. Ragnar Olsen var› valdur á tí listanum. Listi B var fyri Rituvík, og hann fekk eisini ein lim. Regin Olsen fekk flest persónligar atkvø›ur á lista C og var› tí valdur.

Listi A var fyri restina av valdøminum, og hann fekk sjey limir valdar. Teir vóru Rodmund Nielsen, Kári P. Højgaard, Hans Petur Ellingsgaard, Hans Tausen Olsen, Marja Lamhauge, Sæunn Ólavsdóttir Hansen og Regin Jacobsen.

Luttøkan var eitt vet hægri enn fyri f‡ra árum sí›ani. 1393 fólk greiddu atkvø›u, og ta› er 82,4%. 1691 fólk hava valrætt í kommununi.



Stórur spenningur var um úrsliti› og dúgliga var› tosa› millum valstø›ini. Her er Hans Jacobsen, forma›ur fyri valst‡rinum fyri Glyvra valdømi farin í telefonina at kunna valnevndina um úrsliti›

Sigur ikki nei til formanssessin

34 ára gamli Rodmund Nielsen var tann stóri atkvø›uslúkurin á b‡rá›svalinum í Runavík. Nú skal n‡valda b‡rá›i› velja ein formann, og Rodmund er eitt heitt evni til hetta starvi›. Hann sigur neyvan nei takk, um ta› stendur honum í bo›i

KOMMUNUVAL
Stefan í Skorini

Runavík: Ta› kom kanska eitt sindur dátt vi› hjá fleiri, at Rodmund Nielsen fór avsta› vi› teimum flestu atkvø›unum vi› b‡rá›svali› hesufer›. Hann kannar sær tó ikki formanssessin beinanvegin.

– Ta› er ein ógvuliga opin spurningur, hvør ver›ur forma›ur, men ein forma›ur skal sjálvandi hava ein meiriluta aftanfyri seg, sigur Rodmund, sum tó ikki vísir aftur, at hann tekur av, um starvi› stendur honum í bo›i.

– Ta› er ein ógvuliga torførur spurningur at taka stø›u til her og nú, tí hetta er alt so n‡tt fyri meg, og eg havi eisini eitt anna› starv. Alt stendur púra opi›, men hví ikki taka av, um møguleikin b‡›st.

Rodmund stilla›i upp seinast, men tá fekk hann bara 39 atkvø›ur. Einar hundra› eru lagdar afturat teimum, og nú fekk hann 135 krossar.

– Eg vænta›i als ikki at fáa so gó›a undirtøku, so eg eri ógvuliga bilsin av hesum, sigur Rodmund.

Rodmund hevur annars roynt seg eitt sindur í kommunalpolitikki. Hann er varalimur og hevur tvær fer›ir roynt at veri› vi› í b‡rá›num í stutta tí›. Hann hevur einafer› fyrr veri› uppstilla›ur.

Rodmund, hvørs dagliga yrki er at vera lei›ari í Statoil-stø›ini í Saltangará, heldur sjálvur ikki, at hann hevur gjørt naka› meira enn hinir í valstrí›num fyri at ver›a valdur.

– Eg haldi ikki, at eg haviført eitt hart valstrí›. Kanska hevur ta› havt sína ávirkan, at eg eri ta› einasta valevni á Glyvrum, sum hevur stilla› upp.

Ta› er ikki naka› serligt mál, sum skal loysast her og nú, i› Rodmund hevur uppá hjarta›.

– Eg haldi, at eg havi koyrt nógv uppá, at nøkur ting skulu setast út í korti›, og nakrar langtí›arætlanir skulu leggjast. T.d. vi›víkjandi skúlaverkinum í økinum.

Útskiftingin hevur veri› ómetaliga stór í b‡rá›num hesufer›, og Rodmund er ein av teimum sjey n‡ggju persónunum.

– Hetta kemur eitt sindur óvart á fleiri her inni, at so nógv ikki vór›u afturvald, og fólk standa eitt sindur spyrjandi eftir vali›. Nøkur høvdu kanska eina kenslu av, at okkurt n‡tt valevni var› valt, men at ta› fór at vera sjey n‡ggir limir, ta› vænta›i eingin.

Fleiri mál standa fyri framman, sum hetta b‡rá›i› skal loysa. Havnaútbyggingin, ein komandi oljuvinna, n‡ggjur skúli og barnaansing er alt stórmál, i› krevja eina loysn.

Rodmund Nielsen fekk flest persónligar atkvø›ur. Hann vil tó ikki siga, at hann ver›ur tann komandi b‡rá›sforma›urin, men hann avsannar ikki, at hann tekur av, um møguleiki ver›ur fyri tí